## Ísland ikki upp í ES nú

Formaðurin í Evropatinginum, Hans-Gert Pöttering, hevur als ikki somu áskoðan sum Olli Rehn, upptøkukommisetur, tá tað snýr seg um møguleikarnar fyri íslendskum limaskapi í ES. Olli Rehn hevur sagt, at samráðingarnar um íslendskan limaskap kunnu avgreiðast so skjótt, at landið kann fáa limaskap longu í 2010 ella 2011. Men so lætt er tað ikki sambært Hans-Gert Pöttering. Við finska blaðið Aamulehti. sigur tingformaðurin, at tað er ikki rætt at tosa um at taka fleiri lond upp í ES nú.



## ATP stórt hall

Tann stóri danski pensjónsgrunnurin ATP hevði eitt stak vánaligt ár í fjør. Roknskapurinm, sum bleiv almannakunngjørdur í morgun, vísir, at felasgið hevði 25,7 milliardir krónur í halli í 2008 ímóti 2,9 milliardum krónum í avlopi í 2007. Leiðslan sigur, at fellandi virðið á partabrøvum var høvuðsorsøkin til tað vánaliga úrslitið. Bara av hesum misti ATP 29,7 milliardir krónur í fjør. Grunnurin sigur, at fíggjarkreppan ger tað vónleyst at siga nakað um, hvussu 2009 fer at roynast.

# Skattalætti gav eina milliard

**- Skattalættin hjá ABC-samgonguni, sum varð útroknaður til 240 milliónir yvir fýra ár, hevur ført til, at landskassin í fjør fekk eina milliard meiri í inntøkum í mun til fyri fýra árum síðani, sigur Jørgen Niclasen, formaður í Fólkaflokkinum**

SKATTAPOLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað var undanfarna ABC-samgonga, sum samtykti at lata skattalættar fyri áleið 60 milliónir krónur um árið í fýra ár, ella tilsamans 240 milliónir krónur.

Men tá CHE-samgongan tók við eftir valið í januar í fjør, samtykti hon, at strika skattalættan, sum skuldi koma í gildi 1. janaur 2009.

Sum kunnugt helt hendan samgongan ikki leingi, og í september í fjør varð so ABC-samgongan endurstovnað.

- Meðan vit sótu í andstøðu royndu vit at leggja broytingaruppskot fram, sum helt fast við skattalættan, men tað fingu vit ikki undirtøku fyri. Og undir samgongusamráðingunum fekst heldur ikki meiriluti fyri hesum. Tað endaði kortini við einum kompromii, sum gekk út upp á, at seta í gildi ein skattasteðg, og at sjúkrakassagjaldið frá 1. januar 2010 skuldu gjaldast yvir skattin, sigur Jørgen Niclasen.

Hann heldur tað er undarligt, hvussu tað ber til at rokna inntøkurnar hjá landskassanum út.

- Hesir skattalættarnir, sum latnir vórðu undir undanfarnu ABC-samgongu, og sum vórðu roknaðir til 240 milliónir krónur, hava merkt eina meirinntøku til landskassan í fjør upp á eina milliard krónur, sigur Jørgen Niclasen.

Hann sigur, at skattalættin førdi til ein størri produktivitet og eitt minni arbeiðsloysi.

- Summir politikarar halda, at um vit økja skattin úr 50% upp í 100%, so fær landskassin dupult so nógv inn, men soleiðis virkar tað bara ikki. Tað er søguliga prógvað, at høgur skattur drepur hugin hjá fólki at arbeiða, meðan lágur skattur hinvegin eggjar fólki til at gera ein eyka innsats, sigur Jørgen Niclasen.



*Jørgen Niclasen, formaður Fólkafloksins. Drepandi høgur skattapolitikkur hvur lagt mangt eitt blómandi samfelag í oyði – tað vísir søgan*

### Nærmast manipulatión

Hann vísir til kreppuna fyrst í 90-árunum, tá skattirnir vórðu trýstir í topp. Landskassin hóraði nóg illa undan, og ikki fyrr enn í 1996, tá landsstýrið, við Jóannesi Eidesgaard sum fíggjarmálaráðharra, lækkaði skattin, kom gongd á.

- Tá fór samfelagið aftur at blóma. Fólk fingu aftur hug at arbeiða, og hetta sást týðiliga aftur í skattainntøkunum hjá landinum, sum vuksu munandi, sigur Jørgen Niclasen.

Hann sigur, at tað er ein sannroynd, at tá fólk hava meiri eftir til sín sjálvs, so veksur hugurin til at arbeiða og tjena meira. Og tá skattatølini fyri januar í ár vísa eina meirinntøku i mun til januar mánaða í fjør, so er talan um so lítlan vøkstur, at tað, at leggja ov nógv í hetta nærmast má kallast manipulatión við tølunum.

- Vit tosa um eina meirinntøku í skatti upp á 1,8 milliónir av einari samlaðari lønarútgjalding upp á 600 milliónir krónur. Tað er jú so at siga somu tøl. Og fyri alt tað, so sæst virkningurin ikki fyrr enn eftir nøkrum mánaðum ella kanska enn tá árum, sigur Jørgen Niclasen.

Hann vísir á, at tá undanfarna ABC-samgonga tók við í 2004 sást einki til skattalættan fyrsta árið, og bert lítið næsta árið heldur.

- Tað tekur sjálvandi sína tíð, áðrenn virkningurin slær ígjøgnum. Men sum eg nevndi fyrr, so merkti skattalættin upp á 240 milliónir eina meirintøku til landskassan í fjør upp á eina milliard í mun til fyri fýra árum síðani, sigur Jørgen Niclasen.

# Ilt at meta um

**Sofus Debes Johannesen av skattadeildini hjá TAKS heldur ikki, at tað ber til at gera metingar á so lítlum grundarlagi sum einum mánaði**

SKATTAPOLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað eru alt ov nógvir ótryggleikar við at gera nakrar sammetingar, sum geva meining, á einum so tunnum grundarlagi sum einum mánaði.

Talan er um lønarútgjald upp á 595 milliónir krónur í ár í mun til 599 milliónir í fjør.

- Tað ber als ikki til at siga út frá hesum, hvussu gongdin fer at vera. Eitt nú kann eitt stórt útslag vera útgjald til tímalønt, sum kanska fáa løn 14. hvønn dag, og hvussu tað passar til mánaðin, sigur Sofus Debes Johannesen.

Hann sigur, at talan undir øllum umstøðum er um sera smá tøl – fýra milliónir í mun til 600 – og um skattalættin hevði verið í gildi, hevði tað kanska svara til eitt meðaltal á 2,5 milliónir um mánaðin.

Nú vísa fyribils skattatølini, at landskassin í januar í ár fekk 105.538.897,00 krónur inn í skatti, meðan tilsvarandi upphæddin fyri januar 2008 var 103.717.025,00 krónur. Ella 1.821.894,00 krónur meiri, svarandi til 1,76%.

Sofus Johannesen sigur víðari, at tað er ein størri operatión at gera eina útrokning av skattinum, um skattalættin hevði verið settur í gildi.

So hóast tað ber til at sammeta mánaðirnar, ber ikki til at siga nakað um gongdina í skattainntøkunum hjá landskassanum.

Sosialurin hevur roynt at fingið fatur á Jóannes Eidesgaard, fíggjarmálaráðharra, men hann hevur ikki verið at hitt í morgun. Vit hava tó fingið upplýst, at mvg- og onnur avgjaldstøl ikki eru tøk enn, og tí ber ikki til at siga nakað um, hvussu nógv inntøkurnar á tí økinum eru falnar – nakað, sum roknað verður við í fíggjarmálaráðnum.